# Umsitingarætlan
# fyri
# toska-, hýsu- og upsastovnarnar
# í føroyskum sjógvi

**Upprit frá arbeiðsbólki, settur av**
**landsstýrismanninum**
**í fiskivinnumálum**

**Oktober 2011**

## Innihald

Samandráttur ....................................................................................................................... 4

1. Bakgrund og arbeiðið hjá bólkinum .................................................................................. 5
2. Krøv um burðardyggan fiskiskap ...................................................................................... 6
3. Vísindaliga ráðgevingin ..................................................................................................... 7
4. Umsitingarætlanir og veiðireglur higartil .......................................................................... 9
5. Fyritreytirnar fyri eini umsitingarætlan fyri botnfisk í føroyskum sjógvi ........................... 9
6. Uppskot um eina umsitingarætlan fyri botnfisk í føroyskum sjógvi ................................ 10
7. Átøk at betra um grundarlagið undir umsitingini av botnfiski í føroyskum sjógvi .......... 12

Fylgiskjal : Uppskot um eina umsitingarætlan fyri tosk, hýsu og upsa í føroyskum sjógvi ........ 13

## Samandráttur

Ein arbeiðsbólkur, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum setti í august 2011, hevur gjørt uppskot til eina umsitingarætlan fyri fiskiskapin eftir toski á landgrunninum, og hýsu og upsa í føroyskum sjógvi.

Føroyskir myndugleikar hava ongantíð sett sær ítøkiligar ætlanir fyri fiskiskapin eftir botnfiski í føroyskum sjógvi fyri at tryggja burðardyggan fiskiskap. Tørvur er á slíkum umsitingarætlan-um. Ikki bert sum eitt amboð í okkara egnu umsiting, men eisini mótvegis umheiminum fyri at fáa fiskiskapin góðkendan sum burðardyggan og samsvarandi vísindaligari ráðgeving.

Ein partur av eini umsitingarætlan er ein veiðiregla, sum setir út í kortið, hvussu fiskastovnarnir skulu røkjast og fiskiskapurin skipast í framtíðini. Veiðireglan er eitt slag av tilbúgvingarætlan, sum sigur, at tiltøk skulu setast í verk, tá ávaringarklokkurnar ringja, og vandi er fyri, at fiskastovnarnir nærkast einum niðara vandamarki.

Uppskotið til umsitingarætlan er í tveimum. Fyrst er ein *tillagingarskipan*, har málið er, at í seinasta lagi í 2015 skal royndin vera stillað so, at vit ikki fiska meira enn stovnarnir, sambært fiskifrøðingunum, tola. Síðani er ein *langtíðarveiðiregla*, sum miðar ímóti at halda fiskiskapin á eini lívfrøðiliga og búskaparliga burðardyggari legu.

Hyggja vit at støðuni í fiskastovnunum, so eru batar at hóma fyri toskastovnin. Eftir at tilgongdin hevur verið vánalig fleiri ár á rað, er ein yvir miðal árgangur á veg, og stovnurin er tískil í vøkstri. Lívfrøðiliga ráðgevingin mælir til, at hesin smáfiskurin fær frið at seta til stovnin, og at veiðitrýstið verður minkað.

Veiðitrýstið fyri hýsu er í samsvari við tilráðingarnar, og tí verða ongar serligar reguleringar gjørdar fyri hýsu; men av tí, at stovnurin av hýsu er sera illa fyri, so hevði verið rættast at gjørt serligar tiltøk fyri hýsu. Mett verður tó, at tær reguleringar, ið longu eru gjørdar serliga fyri tosk, og tillagingin av veiðitrýstinum fyri tosk fram til 2015, eisini fara at gagna hýsustovninum.

Gongdin seinastu árini vísir, at upsastovnurin sær út til at tola eitt hægri veiðitrýst enn vísindaligt tilmælt. Í tillagingarskipanini verða tí ongar stórvegis broytingar gjørdar í teimum reguleringum, sum eru fyri fiskiskapin eftir upsa. Her er eisini tikið við, at stórur niðurskurður er gjørdur í dagatalinum fyri verandi fiskiár, og at stórur partur av trolarunum hava fiskað makrel, og fer hetta væntandi at síggjast aftur næsta ár í metingini av veiðitrýstinum fyri upsa.

Uppskotið um umsitingarætlan byggir á, at fiskiskapurin eftir toski, hýsu og upsa er blandingsfiskiskapur, har allir tríggir stovnarnir verða reguleraðir undir einum við fiskidøgum og økisfriðingum. Somuleiðis leggur uppskotið upp til, at tað ikki skal vera neyðugt at stilla fiskidagar o.a. á hvørjum ári. Tað skal bert gerast, um gongdin yvir ávíst áramál vísir, at veiðitrýstið eigur at stillast av nýggjum.

Uppskotið er ikki endaligt, men er ætlað sum grundarlag undir víðari viðgerð og orðaskifti. Almenni myndugleikin í fiskivinnumálum hevur ábyrgdina av umsitingarætlanini. Men skal ætlanin hepnast, er fyritreytin, at vinnan er við í tilgongdini og hevur møguleika at ávirka innihaldið. Tað er eisini umráðandi, at ætlanin er grundfest politiskt – tvørtur um samgongur og valskeið.

Fyri at umsitingarætlanin skal tæna sínum endamáli, er neyðugt, at hon byggir á so gott fakligt grundarlag sum gjørligt. Tað eigur alla tíðina at vera møguligt at taka pulsin á skipanini.

Arbeiðsbólkurin staðfestir, at síðani fiskidagaskipanin varð sett í verk fyri góðum 15 árum síðani, eru ongar eftirmetingar gjørdar av skipanini í síni heild. Eingin heildarmeting er gjørd av um fiskidagaskipanin virkar eftir ætlan, herundir um hvussu gongdin hevur verið viðvíkjandi veiðievnum í flotanum og

veiðimynstrinum. Heldur ikki hevur verið kannað, hvørja ávirkan stongdar leiðir hava.

Slíkar kanningar eru arbeiðskrevjandi, og kunnu bert fremjast, um fíggjarlig orka verður sett av til endamálið.

Kanningar av hesum slagi eru við til at geva okkum hollari vitan um, hvussu skipanirnar roynast. Men tær eru eisini við til at útvega vitan, sum í longdini kann styrkja grundarlagið undir vísindaligu ráðgevingini.

## 1. Bakgrund og arbeiðið hjá bólkinum

Landsstýrissamgongan, Tjóðveldi og Framsókn eru samd um, at "..*øll veiða í føroyskum sjóøki í seinasta lagi í 2015 skal verða fiskað samsvarandi búskapar- og lívfrøðiliga burðardyggum krøvum. Lívfrøðiliga burðardygt skal í hesum førinum skiljast soleiðis, at vísindaligu tilráðingarnar/tilmælini skulu fylgjast, tá ið fiskiorkan, kvotur og fiskidagar verða ásett*."

Í lógaruppskotinum um fiskidagar á Ólavsøku í 2011 boðaði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum frá, at ein ætlan skal gerast fyri, hvussu fiskidagatalið fram til 2015 verður lagað til vísindaliga tilmælið.

Eftir áheitan frá landsstýrismanninum hevur ein arbeiðsbólkur, ið var settur saman av

- Eilif Gaard, stjóra á Havstovuni
- Dennis Holm, formanni í Fiskidaganevndini
- Hans Jákup Joensen, reiðara
- Jákup Reinert, deildarleiðara á Havstovuni
- Petur Steingrund, fiskifrøðingi á Havstovuni
- Jens Helgi Toftum, fulltrúa í Fiskimálaráðnum

gjørt eitt upprit um eina umsitingarætlan fyri toska-, hýsu- og upsastovnarnar, sum í best møguligan mun tryggjar burðardygga gagnnýtslu av tilfeinginum, og sum greinar, hvussu fram eigur at verða farið við atliti at tí støðu, sum stovnarnir verða mettir at vera í.

Bólkurin hevur havt sum útgangsstøði, at umsitingarætlanin skal gerast innan fyri verandi regluverk og skipanir. Karmurin er lógin um vinnuligan fiskiskap og tey amboð, sum verða brúkt í stýringini av fiskiskapinum eftir toski, hýsu og upsa (fiskidagaskipanin og økisfriðingar, umframt meskastøddir, minstamát, ungfiskamát og aðrar tekniskar reguleringar).

Uppskotið til umsitingarætlan fevnir ikki um Føroyabanka.

Tilfarið, ið bólkurin leggur fram, er ikki eitt endaligt uppskot, men fyrsta stigið í arbeiðinum at gera eina umsitingarætlan fyri fiskiskapin eftir botnfiski í føroyskum sjógvi. Tilfarið er ætlað sum grundarlag undir víðari orðaskifti og viðgerð í politisku skipanini, vinnuni og almenninginum yvirhøvur.

Hóast ein umsitingarætlan fyrst og fremst er ábyrgdarøkið hjá almenna myndugleikanum í fiskivinnumálum, so er sera umráðandi, at myndugleikin tryggjar, at allir áhugaðir partar í vinnuni hava veruligan møguleika at koma til orðanna. Ein umsitingarætlan er í hesum samanhangi at rokna sum ein avtala millum myndugleikar og vinnu, um hvussu vit skipa fiskiskapin tey næstu árini, eins og semjan um fiskidagaskipanina var tað miðskeiðis í 1990-unum.

## 2. Krøv um burðardyggan fiskiskap

Í føroyskari lóggávu og í fleiri altjóða sáttmálum og skipanum, sum Føroyar eru partur av, er kravið, at fiskiskapurin er burðardyggur. Harafturat møta vit øktum krøvum frá keyparum um at skjalprógva, at fiskavørurnar, sum verða útfluttar úr Føroyum, hava sín uppruna úr burðardyggum fiskiskapi.

**Føroyska lógarverkið og burðardyggur fiskiskapur**
Lógin um vinnuligan fiskiskap fevnir um vinnuligt at gagnnýta livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum. Í umsitingini av lógini skal dentur leggjast á, … *at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga, við virðing fyri sambandinum millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra, til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkastið frá fiskivinnuni, støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið.*

Hesar endamálsorðingar eru rættiliga breiðar. Í stuttum er tó talan um eitt stovnsrøktarendamál, eitt búskaparligt endamál og eitt samfelagsligt endamál. Stovnsrøktarendamálið er rokkið, um gýtingarstovnurin er omanfyri ávísa minstustødd, og at veiðitrýstið síðani er so, at ikki ov nógv verður veitt úr stovninum á hvørjum ári.

Búskaparliga endamálið er rokkið, um fiskiveiðan innan fyri hesar karmar er før fyri at útvega fiskimonnum rímiliga úrtøku, at nóg mikið er til rakstur og kapitalútreiðslur, at møguleiki er fyri, at fiskiflotin kann endurnýggjast, og at tilfeingisrentan kemur samfelagnum til góðar.

Samfelagsliga endamálið snýr seg um at tryggja inntøku og arbeiðsmøguleikar kring alt landið.

Við eini umsitingarætlan verða breiðu endamálsorðingarnar í lógini raðfestar og gjørdar ítøkiligari, so tær kunnu brúkast í praktiska politikkinum. Tað snýr seg um at seta orð á hugtakið "burðardygd".

**Altjóða krøv um burðardyggan fiskiskap**
Í altjóða samanhangi eru fleiri sáttmálar, yvirlýsingar og leiðreglur, har Føroyar, saman við øðrum londum, hava fest á blað meginreglur um burðardyggan fiskiskap. Nógvar av hesum meginreglum eru longu, ella koma at verða, eitt krav, sum verður nýtt fyri at ein ávísur fiskiskapur skal fáa heitið "burðardyggur".

Í hesum sambandi skal fyrst verða víst til *Havrættarsáttmálan hjá ST* frá 1982 (staðfestur av Løgtinginum í 2003), sum gevur strandarlondum rætt til at gagnnýta livandi náttúrutilfeingi í heimasjógvi, men sum eisini áleggur londunum skyldur. Strandarlandið skal tryggja, at livandi tilfeingið ikki verður trároynt, og skal seta í verk tiltøk til tess at tryggja, at stovnarnir verða varðveittir á eini legu, sum gevur mest varandi úrtøkuna (maximum sustainable yield, MSY).

Eitt úrslit av *Rio-ráðstevnuni* í 1992 er Agenda 21, sum leggur dent á fyrivarnisregluna í umsitingini av náttúrutilfeingi. Henda regla um fyrivarni er eisini ein partur av *Avtaluni um varðveiting og umsiting av millumøkja- og víðferðandi fiskastovnum frá 1995,* sum Føroya Løgting staðfesti í 2000.

*Johannesburg Yvirlýsingin* frá 2002 leggur dent á vistskipanarliga sjónarmiðið (eco-system approach) og at skipa fiskiskapin á ein hátt, sum gevur mestu varandi úrtøkuna (maximum sustainable yield, MSY).

Afturat hesum kann nevnast, at í FAO, sum er mat- og landbúnaðarstovnurin hjá ST, eru londini komin ásamt um fleiri leiðreglur um stovnsrøkt og gagnnýtslu av livandi tilfeinginum í sjónum. Her skal serliga nevnast *FAO atferðarreglurnar um fiskiskap við ábyrgd* (Code of Conduct for Responsible Fisheries) frá 1995.

**Umhvørvismerking og brúkarakrøv**
Føroyskir útflytarar hava seinnu árini møtt øktum krøvum um at skjalprógva, at fiskavørurnar, sum verða útfluttar úr Føroyum, hava sín uppruna úr burðardyggum fiskiskapi.

Privat feløg, t.d. Marine Stewardship Council (MSC), hava boðið seg fram fyri m.ø. evropeiskum framleiðarum og sølufyritøkum at góðkenna, at vørurnar lúka hesar treytir. Í hesum sambandi skal eisini vera víst á, at vísindaliga ráðgevingin frá ICES hevur sera stóran týdning, tí tær fyritøkur, ið veita góðkenning um burðardyggan fiskiskap, styðja seg fyrst og fremst til ICES ráðgevingina.

## 3. Vísindaliga ráðgevingin

Setningurin hjá arbeiðsbólkinum er at gera eitt upprit um eina umsitingarætlan, sum í best møguligan mun tryggjar burðardygga gagnnýtslu av tilfeinginum, og har vísindaligu tilmælini skulu fylgjast, tá ið fiskiorkan, kvotur og fiskidagar verða ásett.

Vísindaligu tilmælini um fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa fáa føroyskir myndugleikar frá Havstovuni. Hesi tilmæli byggja vanliga á tríggjar meginreglur: Vistskipanarliga sjónarmiðið (ecosystem approach), fyrivarnisreglan (precautionary approach) og mestu varandi úrtøkuna (Maximum Sustainable Yield, MSY).

**Vistskipanarliga sjónarmiðið**
Vistskipanarliga sjónarmiðið kann allýsast upp á fleiri mátar. Í stuttum gongur tað út uppá, at umsitingin av fiskiskapinum eigur at síggjast í eini heild, og at atlit eiga at verða tikin fyri øllum vistfrøðiligum viðurskiftum av týdningi. Lívfrøðiliga merkir tað, at í stýringini av fiskiveiðuni skal ein hava í huga sambandið millum ymisku djóra- og plantuverurnar og tess umhvørvi í vistskipanini.

**Fyrivarnisreglan**
Fyrivarnisreglan skal nýtast í breiðum høpi til tess at tryggja livandi tilfeingið í havinum, og at trot á haldgóðum vísindaligum upplýsingum ikki skal nýtast sum grundgeving fyri at lata vera við at fara undir varðveitingar- og umsitingartiltøk.

Lívfrøðiliga miðar fyrivarnisreglan eftir, at gýtingarførι parturin av einum fiskastovni altíð er nóg stórur til, at hann er førur fyri at endurnýggja seg sjálvan og klárar at framleiða eina líkinda tilgongd í vanligum náttúruviðurskiftum.

**MSY-hugtakið og tilvísingarvirði**
ICES er í ferð við at broyta sín leist fyri ráðgeving soleiðis, at dentur verður lagdur á málið um mestu varandi veiðu (Maximum Sustainable Yield, MSY), ið samstundis er burðardygt. Hetta merkir, at tilvísingarvirði verða sett fyri teir ymsu stovnarnar, og so skal ráðgevingin meta um stovnsstøddir og veiðitrýst í mun til hesi virði. Tilvísingarvirðið fyri gýtingarstovn nevnist MSY $B_{trigger}$ og fyri veiðitrýst $F_{MSY}$.

MSY hugtakið er víst á mynd 1 við einum hugsaðum dømi. Á myndini eru tveir y-ásir, vinstrumegin er veiðan, høgrumegin gýtingarstovnurin, og x-ásin vísir veiðitrýstið (fiskideyðin F). Myndin byggir á eitt sonevnt produktiónsmodell, har til ber at rokna eitt veiðitrýst ($F_{MSY}$), og har stovnurin, sum frá líður, vil geva ta størstu varandi veiðuna (MSY). Meiningin er so, at veiðitrýstið skal regulerast soleiðis, at tað í miðal verður $F_{MSY}$. Reguleringin kann gerast við at áseta kvotur ella eina hóskandi veiðiorku (t.d. tal á fiskidøgum), fyri at røkka málinum.

Grundsjónarmiðið í MSY-hugsanini er, at veiðitrýstið er tann variabulin, vit kunnu gera nakað beinleiðis við í reguleringini av fiskiskapinum. Vit kunnu í minni mun stýra stovnsstøddini, m.a. tí, at stovnarnir eisini verða nógv ávirkaðir av skiftandi náttúruviðurskiftum.




**Mynd 1.** Ørvurin vísir tað veiðitrýstið (FMSY), ið sum frá líður í miðal gevur hægstu varandi veiðuna. (X-ásur: Veiðitrýst (F). 1. Y-ásur: Veiða. 2. Y-ásur: Gýtingarstovnur).

**Umsitingarætlanir og veiðireglur**
Ein týdningarmikil partur av eini umsitingarætlan eru reglur, sum greitt tilskila mannagongdir og leiðreglur fyri avgerðum um, hvussu fiskiskapurin skal skipast tað komandi tíðarskeiðið. Hetta er kjarnin í hugtakinum veiðiregla (á enskum "harvest control rule", HCR). Veiðireglan sigur, hvussu vit røkka settum málum, hvat skal gerast, um veiðireglurnar ikki halda, og hvussu skipanin skal fáast aftur á kós. Um fiskastovnarnir eru sera illa fyri, tosar mann ofta um ein "recovery plan" – eina endurreisingarætlan fyri fiskastovnarnar. Mynd 2 er ætlað at vísa høvuðsættirnar í eini veiðireglu, og hvussu veiðireglan virka




**Mynd 2**. Veiðiregla, sum byggir á MSY-sjónarmiðið

Stovnsstøddin, ið sum frá líður gevur størstu varandi veiðuna, verður nevnd $B_{MSY}$. Hendan støddin er trupul at meta neyvt, men um tað ber til at stýra veiðitrýstið til $F_{MSY}$ (í miðal), so hugsar mann sær, at stovnurin fer at sveiggja nakað um eitt miðalvirði ($B_{MSY}$). Hetta minnir um tað, ið Skipanarnevndin segði í 1995, bert við øðrvísi tilvísingarvirðum. Hetta ger eisini, at

tað ikki skuldi verið neyðugt at stilla dagatalið o.tíl. á hvørjum ári. Men tað er tó alla tíðina neyðugt at fylgja væl við stovnsstøddini, og skuldi tað hent, at stovnurin, t.d. vegna broytt viðurskifti í vistskipanini, skuldi minkað ella vaksið nógv, hóast veiðitrýstið í miðal liggur um $F_{MSY}$, so kann gerast neyðugt at tillaga veiðitrýstið.

Í veiðiregluni, víst á mynd 2, er ein stovnsstødd, $B_{MSY\text{-}trigger}$ (ið sum oftast er á leið tað sama sum $B_{pa}$ í PA ráðgevingini). Um gýtingarstovnurin fer niður um hetta, skal veiðitrýstið minkast, og longur hann fer niður um hetta virðið, meira skal veiðitrýstið minkast. Hvat skal henda, tá gýtingarstovnurin verður heilt lítil (brotna farstrikan á myndini), er ikki heilt vist, men allarhelst verður lívfrøðiliga ráðgevingin tá at gevast við fiskiskapinum. Ein slík veiðiregla vil fyri Føroyar merkja, at tað bert í heilt fáum førum verður mælt til heilt at steðga fiskiskapinum.

## 4. Umsitingarætlanir og veiðireglur higartil

Føroyskir myndugleikar hava ongantíð sett í verk langtíðar ætlanir ella sett sær ítøkilig mál fyri umsiting av botnfiskastovnum í føroyskum sjógvi.

Ofta verður víst til eina veiðireglu, sum sigur, at burðardyggur fiskiskapur fæst, um samlaða talið av fiskidøgum verður sett soleiðis, at vit í miðal fiska ein triðing úr hvørjum stovni (í tali) um árið. Henda veiðiregla er nevnd í frágreiðingini frá Skipanarnevndini 1995, sum legði lunnar undir fiskidagaskipanina.

Men veiðireglan um, at vit í miðal ikki skulu taka meira enn ein triðing úr stovnunum um árið, er ongantíð formliga staðfest í politisku skipanini, og hevur ikki verið nýtt sum leiðregla, tá avgerðir eru tiknar um, hvussu fiskiskapurin eftir botnfiski undir Føroyum skal skipast, og er heldur ikki í samsvari við vísindaliga tilmælt veiðitrýst.

Politiskt góðkendar umsitingarætlanir eru tó ikki heilt ókendar í føroyskum samanhangi. Ein týdningarmikil partur av strandarlanda-avtalunum um norðhavssild, makrel og svartkjaft er ein langtíðarætlan fyri umsiting av hesum stovnum.

Langtíðarætlanirnar áseta reglur um, hvussu TAC-ið skal ásetast við støði í vísindaligu ráðgevingini. Tær hava eitt lægstamark fyri gýtingarstovnin, og hvussu nógv skal takast úr stovninum. Tær siga eisini, hvussu fram skal farast, um gýtingarstovnurin fer niður um lægstamarkið, ella veiðitrýstið fer upp um ásett tilvísingarvirði. Løgtingið hevur staðfest strandarlandaavtalurnar um norðhavssild, makrel og svartkjaft.

## 5. Fyritreytirnar fyri eini umsitingarætlan fyri botnfisk í føroyskum sjógvi

Ein umsitingarætlan fyri tosk, hýsu og upsa í føroyskum sjógvi má lagast eftir tilfeingis-grundarlagnum og fiskiskapinum (vistskipan, fiskastovnar, fiskasløg, veiðihættir o.s.fr.), og gerast innan fyri verandi regluverk og tey stýrisamboð, sum verða brúkt í fiskiskapinum eftir toski, hýsu og upsa (fiskidagaskipanin og økisfriðingar, umframt meskastøddir, minstamát og aðrar tekniskar reguleringar).

Føroyar hava valt at stýra fiskiskapinum eftir toski, hýsu og upsa í føroyskum sjógvi við fiskidagaskipan. Toskur og hýsa verða fiskað í blandingsfiskiskapi, mest við húki, meðan upsi verður fiskaður við troli við ávísari hjáveiðu av toski og hýsu. Skipanin miðar ímóti, at ein ávísur partur (í tali) av stovnunum skal veiðast árliga (t.e. veiðitrýst). Endamálið við fiskidagaskipanini er at stýra royndini, mótsett fiskikvotum, sum seta hámark fyri, hvussu nógv kann fiskast.

Fiskidagaskipanin byggir á útrokningar av veiðievnunum hjá fiskiførum, t.e. hvussu stórt veiðitrýst eitt miðalfiskifar í hvørjum skipabólki fremur hvønn dag. Fiskidagaskipanin og býtið av fiskidøgum millum bólkar var upprunaliga gjørt soleiðis, at hetta saman við øðrum reguleringum av fiskiskapinum eftir teimum trimum høvuðsfiskasløgunum skal føra til eitt miðalfiskideyðatal (F) fyri hvønn stovnin upp á 0,45, sum svarar til eina miðal árliga veiðu upp á 33% av stovninum (í tali). Hugsanin var eisini, at skipanin skal vera sjálvregulerandi, tí at fiskiskapurin vil flyta millum stovnarnar alt eftir, hvussu teir eru fyri, og at eingin stovnur tí verður trároyndur.

Fiskidagaskipanin er ætlað at regulera allan botnfiskiskapin undir einum, og ikki sum í vanligum TAC- og kvotuskipanum, har hvør stovnur verður reguleraður hvør sær.

Fiskidagaskipanin regulerar fiskiorkuna, og er høvuðsamboðið í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi. Men fleiri onnur amboð verða eisini brúkt. Í fiskiskapinum eftir toski, hýsu og upsa hava hesi amboð týdning:

- *Veiðiloyvi* er góðkenning av einum skipi til at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi á føroysku landleiðunum. Talið av veiðiloyvum, ið koma undir fiskidagaskipan eftir botnfiski í føroyskum sjógvi, er avmarkað til talið av veiðiloyvum, sum var útskrivað 1. januar 1995. Veiðiloyvisskipanin avmarkar sostatt atgongdina til at fiska botnfisk í føroyskum sjógvi.

- *Fiskiloyvi* verður latið eigara av fiskifari eina ferð um árið og tilskilar, hvussu nógvar fiskidagar fiskifarið hevur.

- *Økisfriðingar* kunnu hava ymisk endamál. Í nógvum førum er høvuðsendamálið lívfrøðiligt. Her kann talan vera um gýtingarfriðingar, friðing av smáfiskaleiðum, bráðfeingis veiðibann á leiðum við nógvum ungfiski ella, at beinleiðis veiða eftir ávísum fiskasløgum bert er loyvd uttan fyri ávísar dýpdarlinjur. Í øðrum førum er endamálið ikki so nógv stovnsrøkt, men meira at halda ymiskar reiðskapir atskildar.

- *Tekniskar reguleringar* er tann stýringsháttur, sum hevur verið nýttur longst í fiskiskapinum undir Føroyum. Tekniskar reguleringar fevna um reiðskap (meskastøddir, skiljirist o.tíl.), minstamát á fiski og ungfiskamát. Tær eru oftast grundaðar á eina fatan um, at úrtøkan í veiðini gerst størri, um fiskurin ikki verður veiddur, fyrrenn hann hevur rokkið eini ávísari stødd.

## 6. Uppskot um eina umsitingarætlan fyri botnfisk í føroyskum sjógvi

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt eitt ítøkiligt útkast til eina umsitingarætlan fyri fiskiskapin eftir toski á landgrunninum, og hýsu og upsa í føroyskum sjógvi. Eftir politisku semjuni skal ætlanin vera grundað á vísindalig tilmæli.

Umsitingarætlanin er tí gjørd við støði í seinastu metingunum og tilmælunum hjá Havstovuni um støðuna í teimum trimum høvuðsfiskastovnunum, sum vórðu latin landsstýrismanninum í fiskivinnumálum á sumri 2011.

Í fylgiskjalinum til hetta upprit er uppskot um umsitingarætlan, har høvuðstættirnir eru hesir:

- Umsitingarætlanin fevnir um tosk, hýsu, og upsa, og hevur sum endamál, at øll veiða eftir toski, hýsu og upsa í føroyskum sjógvi í seinasta lagi í 2015 skal verða fiskað samsvarandi lívfrøðiliga og búskaparliga burðardyggum krøvum.

- Umsitingarætlanin er í tveimum: Fyrst ein *tillagingarskipan*, har málið er, at veiðitrýstið á teimum trimum høvuðs-fiskastovnunum í seinasta lagi í 2015 er komið á eina legu, sum gevur størstu varandi úrtøkuna úr fiskastovnunum. Síðani er ein *langtíðarveiðiregla*, sum tekur yvir, tá málini í tillagingarskipanini eru nádd.

- Bulurin í umsitingarætlanini er ein veiði-regla, sum setir út í kortið, hvussu fiskastovnar skulu røkjast, og fiskiskapurin skipast í framtíðini. Veiðireglan ásetir, hvussu stóran part vit kunnu taka úr fiska-stovnunum á hvørjum ári. Harafturat er eitt lægstamark sett fyri hvønn stovnin. Málið er so at stýra fiskiskapinum soleiðis, at vit eru innan fyri ásett mørk. Um vit fara út um hesi mørk, skulu tiltøk setast í verk. Hetta kann gerast við stillingum í dagatalinum, stongd-um leiðum og tekniskum reguleringum.

- Umsitingarætlanin leggur upp til, at tað ikki skal verða neyðugt at stilla reguleringarnar á hvørjum ári. Tiltøk skulu bert setast í verk, um gýtingarstovnurin er undir lægsta-markinum og veiðitrýstið undanfarnu trý árini í miðal er omanfyri $F_{MSY}$.

- Eitt grundsjónarmið í umsitingarætlanini er, at veiðimøguleikarnir og karmarnir hjá vinnuni ikki skulu broytast ov nógv ár um ár. Ein partur av veiðiregluni er tí, at tá málið í tillagingarskipanini er rokkið, kann fiskidagatalið ongantíð verða sett meira enn fimm prosent hægri ella lægri enn fiskiárið frammanundan, um gýtingarstovnarnir eru oman fyri minstuvirðini og veiðitrýstið tætt við $F_{MSY}$. Endamálið við hesum er at forða fyri stórum sveiggjum í fiskimøguleikunum.

Ein umsitingarætlan setur karmarnar fyri, hvussu fiskastovnarnir skulu røkjast, og hvussu fiskiskapurin skal skipast tey komandi árini. Tí avmarkar hon í ávísan mun rásarúmið í fiskiveiðipolitiskum avgerðum. Veiðireglan bindir politisku skipanina og umsitingina soleiðis, at tá ávaringarlampurnar lýsa, og vandi er á ferð, skulu ávís stig takast fyri at fáa skipanina aftur á kós.

Fyritreytin fyri, at ein slík skipan kann virka eftir ætlan, er, at hon er grundfest politiskt og ikki minst, at hon hevur undirtøku í vinnuni. Til tess er umráðandi, at allir avvarðandi partar hava veruligar møguleikar at koma til orðanna í víðari fyrireikingunum.

Men tað er eisini sera umráðandi, at grundarlagið undir skipanini og avgerðunum, sum skulu takast sambært veiðiregluni, er nøktandi og so haldgott sum gjørligt.

Í hesum sambandi hevur tað týdning, at umsitingarætlanin skal kunna eftirmetast, eins og ávirkanin av teimum tiltøkum, sum verða sett í verk, onkursvegna kunnu mátast. Vit eiga at kunna meta um, um tiltøkini í umsitingar-ætlanini birta undir burðardyggan fiskiskap.

## 7. Átøk at betra um grundarlagið undir umsitingini av botnfiski í føroyskum sjógvi

Fyritreytin fyri, at ein umsitingarætlan – og fiskiveiðiumsiting yvirhøvur - skal virka eftir ætlan er, at avgerðirnar byggja á so gott grundarlag sum gjørligt. Í stuttum snýr hetta seg um at skipa so fyri, at tað alla tíðina ber til at fylgja við, hvussu skipanirnar roynast, og at neyðug og skipað hagtøl eru tøk.

Arbeiðsbólkurin heldur, at á hesum øki eru fleiri viðurskifti, sum kunnu betrast.

Arbeiðsbólkurin staðfestir, at síðani fiskidaga-skipanin varð sett í verk fyri góðum 15 árum síðani, eru ongar eftirmetingar gjørdar av skipanini í síni heild. Eingin heildarmeting er gjørd av um fiskidagaskipanin virkar eftir ætlan, herundir hvussu gongdin hevur verið viðvíkjandi veiðievnum í flotanum og veiðimynstrinum. Heldur ikki hevur verið kannað, hvørja ávirkan stongdar leiðir hava.

Slíkar eftirmetingar eru arbeiðskrevjandi, og kunnu bert gerast, um neyðug fíggjarlig orka verður sett av til endamálið. Í hesum sambandi heldur arbeiðsbólkurin, at tað serliga er umráðandi, at Havstovan fær fíggjarligar umstøður at standa fyri slíkum kanningum.

Fiskidagaskipanin er gjørd við støði í útrokningum av veiðievnunum hjá fiskiførum, t.e. hvussu stórt veiðitrýst eitt miðalfiskifar í hvørjum skipabólki fremur hvønn dag. Skipanin og býtið av fiskidøgum millum bólkar var upprunaliga gjørt soleiðis, at hetta saman við øðrum reguleringum skulu føra til eina burðardygga stovnsstødd og veiðitrýst fyri hvønn stovnin sær.

Skal veiðistýringin vera skynsom og burðardygg, er neyðugt, at ein heildareftirmeting verður gjørd av skipanini, hvørt fyritreytirnar eru broyttar, og í hvønn mun hesar hava ávirkað veiðievni og veiðimynstur.

Skipanin við stongdum leiðum er ein annar týdningarmikil partur av stýringini av fiskiskapinum undir Føroyum. Endamálini við stongdum leiðum kunnu vera ymisk, m.a. at halda ymiskan reiðskap atskildan. Men tær hava eisini eitt stovnsrøktarendamál.

Arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at stig verða tikin til at kanna, hvørja ávirkan tað hevur á fiskastovnar og fiskiorkuna, at leiðir verða stongdar heilt ella lutvíst ár um ár. Úrslit av slíkum kanningum kunnu vera við til at betra um grundarlagið undir avgerðum um at friða leiðir, og hevur eisini stóran týdning fyri skipanir við umsitingarætlanum og veiðireglum.

Arbeiðsbólkurin ásannar tó, at tað kann vera torført at staðfesta virknaðin av einum stongdum øki.

Eftirmetingar av fiskidagaskipanini og kanningar av stongdum leiðum eru í sjálvum sær ein fyritreyt fyri at kunna meta um, hvussu skipanirnar roynast. Men slíkar kanningar eru eisini við til at útvega okkum hollari vitan og skipað hagtalsgrundarlag, sum so aftur kann nýtast í sambandi við vísindaligu ráðgevingina.

Vísindaliga ráðgevingin fyri tosk, hýsu og upsa byggir á stovnsmetingar, sum verða gjørdar á Havstovuni og í ICES. Ráðgevingin frá ICES verður vanliga givin fyri hvønn stovn sær, og er mest lagað til TAC-skipanir. Ráðgevingin sigur okkum, hvussu stovnarnir eru fyri, og um vit troyta stovnarnar skynsamt.

Tær kanningar og eftirmetingar, sum arbeiðsbólkurin heldur eru neyðugar at gera av fiskidagaskipanini og stongdum leiðum, kunnu vera við til at útvega dagførda vitan, sum kann geva betri grundarlag fyri at meta um sambandið millum veiðitrýst, veiðievni og fiskidagar.

Sum frá líður kann hetta eisini vera við til at laga vísindaligu ráðgevingina soleiðis, at hon í størri mun hevur møguleika at taka atlit at, at vit hava eina effortskipan (fiskidagar), sum regulerar tosk, hýsu og upsa undir einum.

## Fylgiskjal : Uppskot um eina umsitingarætlan fyri tosk, hýsu og upsa í føroyskum sjógvi

1. **Virkisøki**
Umsitingarætlanin fevnir um toska-, hýsu- og upsastovnarnar á føroysku landleiðunum.

2. **Endamál**
Endamálið við umsitingarætlanini er, at øll veiða eftir toski, hýsu og upsa í føroyskum sjóøki í seinasta lagi í 2015 skal verða fiskað samsvarandi lívfrøðiliga og búskaparliga burðardyggum krøvum.

3. **Veiðireglur (Harvest Control Rules)**
Veiðireglan fyri tosk, hýsu og upsa miðar eftir, at tað, ið verður tikið úr stovninum, er í samsvari við fyrivarnisregluna, og sum í longdini gevur størstu varandi úrtøkuna (MSY).

Veiðireglurnar eru grundaðar á MSY-ráðgeving og vísindalig tilmæli frá Havstovuni.

Umsitingarætlanin er í tveimum:

- Ein tillagingarskipan, har málið er, at veiðitrýstið á teir tríggjar høvuðsfiskastovnarnar í seinasta lagi í 2015 er komið á eina legu, sum gevur størstu varandi úrtøkuna úr fiskastovnunum.

- Ein langtíðarveiðiregla, sum umframt at seta markvirði fyri veiðitrýst, eisini miðar eftir at varðveita stovnarnar á eini støðd, sum gevur størstu varandi úrtøkuna, og sum leggur upp fyri náttúrusveiggjum o.tíl. Langtíðarveiðisetningurin skal eisini tryggja, at ikki ov nógv sveiggj eru í útlutaðum fiskidøgum ár um ár.

Veiðireglurnar eru gjørdar við støði í verandi viðurskiftum. Tað vil siga, at tað er fiskidagaskipanin í verandi líki, saman við økisfriðingum og øðrum reguleringum, sum er byrjanarstøðið, eins og tað eru vísindaligu tilmælini frá Havstovuni í 2011, sum liggja til grund. Um grundarlagið undir vísindaligu tilmælunum verður grundleggjandi broytt, eitt nú at lívfrøðiligu tilvísingarvirðini verða broytt, skulu veiðireglurnar stillast samsvarandi.

4. **Tillagingarskipan**
Ein tillagingartíð er galdandi fyri tíðarskeiðið frá 2011 til 2015, har málið er at laga veiðitrýstið F fyri teir tríggjar høvuðsfiskastovnarar, so tað, ið verður tikið úr stovnunum, svarar til $F_{MSY}$. Grundarlagið í tillagingarskipanini eru tilvísingarvirðini í talvu 1.

**Talva 1: Meðal veiðitrýst og mál fyri veiðitrýst í 2015**

| Fiskastovnur | Meðal veiðitrýst, F seinastu 3 árini 2008, 2009, 2010 | Mál fyri veiðitrýst, F, í 2015 ($F_{MSY}$) |
|---|---|---|
| Toskur á landgrunninum | 0,41 | 0,32 |
| Hýsa | 0,24 | 0,25 |
| Upsi | 0,46* | 0,28* |

* Gongdin seinastu árini vísir, at stovnurin, vegna góða tilgongd, sær út til, fyri tíðina, at tola eitt hægri veiðitrýst enn tilmælt. Gýtingarstovnurin hevur seinastu árini verið væl fyri, hóast miðal veiðitrýstið (F) seinastu 3 árini hevur ligið uppi á 0,46, og stovnurin er í løtuni mettur at vera um 110.000 tons. Hetta er væl omanfyri lægstamarkið, 55.000 tons.

Talvan vísir meðalveiðitrýstið fyri tosk, hýsu og upsa árini 2008-2010, og tað veiðitrýst, sum eftir tilmælunum frá ICES gevur størstu varandi úrtøkuna úr stovnunum. Í tillagingartíðini er málið at røkka $F_{MSY}$ fyri teir tríggjar høvuðsfiskastovnarnar í seinasta lagi í 2015.

MSY-sjónarmiðið leggur upp fyri, at veiðitrýstið F og stovnsmetingarnar í vísindaligu metingunum broytast ár um ár. Hetta merkir, at tá málið fyri t.d. toskastovnin er $F_{MSY}$ er 0,32, so skal veiðitrýstið í meðal yvir eitt áramál liggja um 0.32. Málið er at regulera veiðitrýstið soleiðis, at tað í miðal verður $F_{MSY}$. MSY-sjónarmiðið er eisini grundað á, at tann stovnsstøddin, ið sum frá líður gevur størstu varandi veiðuna, er trupul at meta neyvt. Tí er hugsanin, at við at regulera veiðitrýstið til $F_{MSY}$ (í miðal), so kann stovnurin sveiggja nakað um eitt miðalvirði ($B_{MSY}$), ið ikki er neyðugt at kenna so neyvt.

Fyri at røkka hesum máli í tillagingartíðini, er mannagongdin hendan:

4.1. *Toskur og hýsa*

4.1.1. Fiskiárið 2012/2013 verða ongar stillingar gjørdar í skipanini. Grundin er, at bæði í 2010 og 2011 eru stór átøk gjørd við økisfriðingum og stillingum í fiskidøgum. Mett verður, at hesi átøk eiga at sleppa at royna seg tvey tey fyrstu fiskiárini, ið henda umsitingarætlan fevnir um, og fyri at síggja úrslit av átøkunum í 2010 og 2011.

4.1.2. Fiskiárini 2013/2014, 2014/2015 og 2015/16 skal veiðitrýstið fyri tosk tillagast so líðandi, so at tað við fiskiársbyrjan skal vera ávikavist 0,38, 0,35 og 0,32. Verandi veiðitrýst fyri hýsu er í samsvari við MSY regluna; men stovnurin av hýsu er sera illa fyri. Mett verður tó, at tær reguleringar, ið longu eru gjørdar fyri tosk, og tillagingin av veiðitrýstinum fyri tosk fram til 2015, eisini fara at gagna hýsustovninum.

4.1.3. Undan hvørjum fiskiári skal ein meting gerast av, um vit eru á rættari kós. Í hesi meting skulu atlit takast at gongdini í støddini á gýtingarstovninum, veiðitrýstinum, náttúruviðurskiftum og øðrum viðurskiftum, sum hava týdning fyri útlitunum at røkka málinum.

4.2. *Upsi*

Gongdin seinastu árini vísir, at upsastovnurin, sambært vísindaliga tilfarinum, í eina tíð sær út til at tola eitt hægri veiðitrýst enn vísindaligt tilmælt. Í tillagingarskipanini verða tí ikki lagt upp til stórvegis broytingar í teimum reguleringum, sum eru fyri fiskiskapin eftir upsa, herundir fiskidagatal hjá teimum skipabólkum, ið royna mest eftir upsa, og varandi stongdum leiðum, sum eru ætlaðar at verja upsan. Her verður eisini tikið við, at stórur niðurskurður er gjørdur í dagatalinum fyri verandi fiskiár, og at stórur partur av trolarunum hava fiskað makrel, og fer hetta væntandi at síggjast aftur næsta ár í metingini av veiðitrýstinum fyri upsa.

Stovnsmetingarnar vísa, at gýtingarstovnurin av upsa er væl fyri, og verður mettur at vera um 110.000 tons. Hetta er væl oman fyri lægstamarkið, 55.000 tons.

Hóast tað í tillagingartíðini ikki verður sett nøkur ítøkilig veiðiregla fyri upsa, so eigur eitt vakið eyga at verða hildið við gongdini í upsastovninum. Ansast má eftir, at gýtingarstovnurin ikki fer niður um 82.000 tons, sum er miðal av tí lægsta, gýtingarstovnurin hevur verið árini 2000-2010. Um so verður, so má veiðitrýstið (F) líðandi minkast niður ímóti $F_{MSY}$.

4.3. Hóast ásetingarnar í 4.1. og 4.2. skulu tiltøk setast í verk í tillagingartíðini, um tað við fiskiársbyrjan vísir seg, at støddin á einum av fiskastovnunum verður mett at vera undir lægstamarkinum, og vísindaliga metingin vísir, at eingi útlit eru fyri, at gongdin broytist tað komandi fiskiárið.

4.4. Tillagingartíðin endar, tá málini um veiðitrýst eru rokkin, og tá lægstumørkini og fyrivarnisvirðini fyri stovnsstøddirnar í langtíðarveiðisetninginum eru nádd.

## 5. Langtíðarveiðiregla

5.1. Tilvísingarvirðini í langtíðarveiðiregluni eru víst í talvu 2.

**Talva 2: Tilvísingarvirði í langtíðarveiðiregluni**

| **Stovnur** | **Veiðitrýst $F_{MSY}$** | **Verandi meting av gýtingarstovni Tons** | **Lægstamark fyri stødd á gýtingarstovni, $B_{lim}$ Tons** | **Fyrivarnisstødd á gýtingarstovni $MSY_{B\ trigger}$ Tons** |
|---|---|---|---|---|
| Toskur á landgrunninum | 0,32 | 31.400 | 21.000 | 40.000 |
| Hýsa | 0,25 | 22.300 | 22.000 | 35.000 |
| Upsi | 0,28* | 110.600 | ** | 55.000 |

* Sí viðmerking í talvu 1

** $B_{lim}$ fyri upsa er ikki ásett í ICES-ráðgevingini

### *5.2. Toskur og hýsa*

5.2.1. Um støddin á einum av stovnunum undanfarnu trý árini, við fiskiársbyrjan, verður mett at vera á sama støði sum fyrivarnisstøddin á gýtingarstovninum, sambært talvu 2, skulu tiltøk setast í verk fyri at avmarka veiðina eftir hesum stovni. Hetta kann gerast við tíðaravmarkaðum friðingum og/ella tekniskum reguleringum fyri teir skipabólkar, ið royna mest eftir hesum stovni.

5.2.2. Um støddin á einum av stovnunum undanfarnu trý árini, við fiskiársbyrjan, verður mett at vera undir fyrivarnisstøddina, og yvir lægstamarkinum, sambært talvu 2, verður fiskidagatalið hjá teimum skipabólkum, ið fiska mest av hesum stovni, tillagað við støði í vísindaligu tilmælunum, umframt at onnur tiltøk, fyri at avmarka veiðina, verða sett í verk.

5.2.3. Um støddin á einum av stovnunum undanfarnu trý árini, við fiskiársbyrjan, verður mett at vera undir lægstamarkinum, sambært talvu 2, verður fiskidagatalið hjá teimum skipabólkum, ið fiska mest av hesum stovni, tillagað við støði í vísindaligu tilmælunum. Eisini verða onnur tiltøk sett í verk fyri at avmarka veiðina, umframt at veiðireglan skal eftirmetast.

### *5.3. Upsi*

Gongdin seinastu árini bendir á, at upsastovnurin, vegna góða tilgongd, sær út til, fyri tíðina, at tola eitt hægri veiðitrýst enn tey verandi tilvísingarvirðini.

Í tillagingartíðini fram til 2015 verður gjørd ein langtíðar veiðiregla fyri upsa.

5.4. Tá langtíðarveiðireglan er galdandi – t.e. tá gýtingarstovnurin er oman fyri minstuvirðini, og veiðitrýstið er tætt við $F_{MSY}$ - kann fiskidagatalið ongantíð verða sett meira enn fimm prosent hægri ella lægri enn fiskiárið frammanundan.

5.5. Veiðireglan skal eftirmetast í minsta lagi triðja hvørt ár, fyrstu ferð áðrenn 31. august 2012.

5.6. Tey tiltøk, ið verða sett í verk, sambært 5.2 og 5.3, skulu setast í verk mótvegis tí parti av flotanum, sum fiskar mest av tí fiskastovni, sum tiltøkini eru ætlað at regulera.

## 6. Veiðiumsitingin – fyrisiting og mannagongdir

Løgtingið er lóggevandi og evsta vald í fiskivinnumálum. Fiskimálaráðið hevur yvirskipaðu fyrisitingarligu ábyrgdina av málsøkjunum innan fiskivinnu og umsiting av fiskiskapinum við støði í lógini um vinnuligan fiskiskap og kunngerðum við heimild í lógini. Havstovan og ICES geva vísindaligar tilráðingar um fiskiskap og gagnnýtslu av fiskastovnunum. Fiskiveiðieftirlitið fyrisitur eftirlit við lógini og kunngerðum á sjógvi og landi.

*Áseting av fiskidøgum*
Høvuðsamboðið í umsitingini av fiskiskapinum eftir toski, hýsu og upsa er fiskidagaskipanin. Løgtingið ásetir fiskidagatalið fyri hvørt fiskiár (september – august). Fiskidagar verða ásettir fyri bólkar av fiskiførum. Fyri størru fiskiførini verða dagarnar tillutaðir sum egnir fiskidagar, meðan smærru útróðrarbátarnir fiska av felags fiskidøgum.

Landsstýrismaðurin leggur uppskot fram til løgtingslóg um fiskidagar á Ólavsøku, og gevur í viðmerkingunum til uppskotið frágreiðing við øllum upplýsingum av týdningi viðvíkjandi ásetingini av fiskidøgum. Uppskotið um fiskidagar fer í løgtingsnevnd, sum í síni viðgerð hoyrir sjónarmiðini hjá flestu skipabólkum og øðrum áhugamálum knýtt at fiskivinnuni.

Fiskidagar fyri komandi árið verða ásettir í seinasta lagi 18. august sama árið, fiskiárið byrjar.

*Økisfriðingar*
Økisfriðingar hava verið brúktar í føroyskum sjógvi í nógv ár, og eru eisini ein týdningarmikil partur av veiðiumsitingini. Økisfriðingarnar eru partur av lógini um vinnuligan fiskiskap og kunngerðum við heimild í lógini.

Fleiri sløg av økisfriðingum verða brúktar.

*Bráðfeingis veiðibann (real time closures)*: Síðani 1993 hevur Fiskiveiðieftirlitið havt heimild at seta bráðfeingis veiðibann á leiðum, har íblandingin av ungfiski er ov stór. Skiparin á fiskifari hevur skyldu at boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, um íblandingin av ungfiski er omanfyri ein nærri ásettan prosentpart av veiðuni í hvørjum háli ella setu. Fiskiveiðieftirlitið ger síðani av, um leiðin skal stongjast og hvussu leingi.

*Tíðaravmarkað veiðibann*: Høvuðsgýtingarleiðirnar hjá toski eru stongdar í gýtingartíðini – antin fyri øllum reiðskapi ella fyri ávísum reiðskapi. Endamálið er at verja gýtingina og at geva fiski frið í gýtingartíðini.

*Stongdar leiðir fyri troli*: Eini 60 prosent av øllum leiðum í føroyskum øki, har dýpið er minni enn 200 m, er stongt fyri trolveiðu meginpartin av árinum. Føroyabanki er friðaður fyri allari trolveiðu. Leiðirnar innan fyri 12 fjórðingar eru friðaðar fyri troli, tó ikki um summarið, tá eitt

avmarkað tal av trolbátum hava loyvi at trola innanfyri við serligum flatfiskatroli við skiljirist, fyri at minka um hjáveiðuna av toski og hýsu. Fleiri leiðir á landgrunninum, uttan fyri 12 fj., eru eisini stongdar fyri troli alt árið.

*Aðrar friðingar*: Í føroyskum sjógvi eru eisini nøkur viðbrekin øki við korallum stongd fyri botntroli.

*Onnur tiltøk*
Í skipanini eru eisini fleiri onnur tiltøk fyri at gera fiskiskapin lívfrøðiliga og búskaparliga burðardyggan. Minstamát á fiski, minst loyvda meskavídd í troli og botngørnum, skylda at brúka skiljirist í troli o.tíl. Síðani 1994 hevur við lóg verið bannað at blaka veiðu útaftur.

**7. Vísindalig ráðgeving**

Havstovan er fyrisitingarliga skipað undir landsstýrismanninum, og letur landsstýrismanninum upplýsingar viðvíkjandi støðuni í fiskastovnunum og vísindaligar tilráðingar og metingar samsvarandi endamálinum í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Tann 15. juni á hvørjum ári skal Havstovan lata landsstýrismanninum stovnsmetingar, tilmæli um fiskidagar komandi fiskiárið, og hvussu fiskiskapurin skal skipast tað komandi fiskiárið. Broytingar í fiskidagatalinum skulu m.a. vera grundaðar á metingar um, hvat fiskidagatal fyri hvønn høvuðsbólk av fiskiførum best tryggjar, at fiskastovnarnir verða gagnnýttir burðardygt.

Ráðgevingin frá Havstovuni byggir m.a. á niðurstøður hjá ráðgevandi nevndini hjá ICES (ACOM).

**8. Onnur ráðgeving**

Umframt vísindaligu ráðgevingina fær landsstýrismaðurin eisini tilmæli frá Fiskidaganevndini - sum er samansett av umboðum fyri vinnuna á sjónum - um fiskidagar fyri komandi fiskiárið, og hvussu fiskiskapurin skal skipast tað komandi fiskiárið. Broytingar í fiskidagatalinum skulu m.a. vera grundaðar á metingar um, hvat fiskidagatal fyri hvønn høvuðsbólk av fiskiførum best tryggjar, at fiskastovnarnir verða gagnnýttir burðardygt.

**9. Hoyring**

Øll týðandi fiskivinnumál, og øll uppskot til lógir og kunngerðir, sum hava við fiskivinnuna at gera, skulu leggjast fyri Fiskivinnuráðið til ummælis. Fiskivinnumál og tilmæli, sum verða viðgjørd av øðrum nevndum, sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, verða tó bert løgd fyri Fiskivinnuráðið, tá landsstýrismaðurin heldur tað hava týdning fyri málsviðgerðina. Fiskivinnuráðið kann eisini av sínum eintingum taka fiskivinnumál upp til viðgerðar, og lata landsstýrismanninum sítt ummæli.

**10. Fiskiveiðieftirlit**

Fiskiveiðieftirlitið fyrisitur fiskiveiðieftirlit á sjógvi og landi sambært lógini um vinnuligan fiskiskap.

Uppgávurnar hjá Fiskiveiðieftirlitinum, í sambandi við fiskiskapin eftir botnfiski í føroyskum sjógvi, eru m.a. eftirlit og skráseting av fiskidøgum, fylgisveinaeftirlit við skipum, veiðidagbøkur, góðkenning av innvigingarskipanum, eftirlit við avreiðingum hjá føroyskum skipum í føroyskum og útlendskum havnum.